INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

**Móttikið**

03. JULI 2009

**Vestmanna Kommuna**

Vestmanna kommuna
Postboks 91
350 Vestmanna

2. juli 2009
Mál: 1828-006/08-11
Tygara skriv: 2005-568
Viðgjørt: KHP / EML

**Viðvíkjandi broytingum í byggisamtyktini fyri Vestmanna kommunu**

Kommunan hevur í skrivi, dagfest 17. desember 2008, sent Innlendismálaráðnum uppskot til broytingar í byggisamtyktini fyri Vestmanna kommunu til góðkenningar.

Ætlaðu broytingarnar eru:

- Striking av havnarøki á Grønanesi
- Víðkan av havnarøki á Heyganesi og við nýggja havnarlagið
- Alment frítíðarøki Úti á Toft
- Alment frítíðarøki í Flatabø
- Striking av øki til almennar stovnar í Vestri og tilsvarandi víðkan av sethúsaøki
- Víðkan av vinnuøki við Hornaveg
- Alment frítíðarøki rundan um hylin innan fyri nýggja havnarlagið
- Broytingar og tillagingar av miðstaðar- og havnarøki Undir Holmbakka
- Víðkan av frílendinum omanfyri skúlan í Frammbø
- Broyting av ætlaðum vegi og sethúsaøkjum omanfyri Rógvu
- Burturtøka av ætlaðum gongugøtum í Garðastovubønum og ímillum Gerðisveg og Rógvuveg
- Nýtt parkeringsøki í Garðastovubønum
- Broyting av sethúsaøkjum og víðkan av frílendum á Fitjum
- Broyting av ætlaðum vegi og sethúsaøki ímillum Leitisveg og Ovara Veg víðkan av sethúsøki við Leitisveg
- Nýggj økir til frítíðar- og summarhús, húsvognar og tjalding uttan fyri Fossá í millum Ovara Veg og Niðara Veg og á økinum niðanfyri landsvegin Inni á Fjørð
- Harafturat eru fleiri tillagingar gjørdar í bygdaskipanini, so økismark og matrikulmark falla saman
- Byggisamtyktin – økisásetingarnar og byggifyriskipandi reglurnar – eru víðkaðar og dagførdar.

Innlendismálaráðið hevur havt málið til ummælis hjá Býarskipanarnevndini, sum hevur latið Innlendismálaráðnum álit í málinum, skriv dagfest 16. apríl 2009.

Av tí at Býarskipanarnevndin ikki viðmælti øllum broytingunum, valdi Innlendismálaráðið at senda álitið frá nevndini til kommununa til viðmerkingar. Bygdarráðið hevur síðani samtykt at taka viðmerkingarnar frá Býarskipanarnevndini til eftirtektar.

Innlendismálaráðið skal boða frá, at ráðið tekur undir við viðmerkingunum frá Býarskipanarnevndini, og ætlar at góðkenna at byggisamtyktin verður broytt sum omanfyri nevnt, tó í samsvar við viðmerkingunum frá Býarskipanarnevndini, sjá álitið frá nevndini.

Áðrenn Innlendismálaráðið fer at góðkenna broytingina, skal Innlendismálaráðið hava fingið dagførdan byggisamtyktar tekst og kort í 4 einsljóðandi eintøkum. Broytingin og nýggja dagfestingin skulu síggjast týðuliga á hesum eintøkum. Viðvíkjandi sniði av korti o.ø. verður víst til leiðbeiningina frá Løgmálaráðnum frá 19. februar 2008.

Eisini skal Innlendismálaráðið hava kortið sent sum PDF fíl til imr@imr.fo. Tá broytingin verður góðkend, verður saman við góðkenningini sent dagført kortskjal og tekstur við átekning frá Innlendismálaráðnum.

Vegna Innlendismálaráðið

Elsa Østergaard
ráðgevi